# Til minnis um beiggja mín Dallahan hjá Torvaldi



Brádliga komu boðini um at ein kend bygdamynd, og ein kendur sjómaður í Vági, var farin um grindina, heim til tær ævigu bústaðir. Tað var kæri bróður mín Danjal Johan Hjelm, ella betur kendur sum Dallahan hjá Torvaldi. Dallahan var borin í heim 6. septembur 1934 á Krosslið í Vági, sonur kenda skiparan Torvald Hjelm og Mariu Kirke, ættað av Kirkju. Dallahan var næstelstur av 7 systkjum, og sum óvitar var spælipláss okkara, við Krosslið, kaiin og skipini, fjørðurin, mølin og Tjørnabrúgv.

At Dallahan fór at blíva sjómaður var ongantíð nakar ivi. Longu sum 6 ára gamal var hann útatrógva við abba sínum á Krosslið, sum hann het eftir. Abbin, Danjal hjá Akka, mátti tó binda hann í bekkin, so hann ikki fór fyri borð. Einaferð var sluppin "Agnes Louise" í Vági á útróðri uttarliga á Munkagrunninum. Meðan teir seta, kemur ein smádrongur fram eftir dekkinum, tá var tað Dallahan.

Tíðliga lærdi Dallahan at svjmja, og kom hann at gera mangt bragdið. Einaferð lógu Ragnar hjá Sámali Johannesen og Høgni hjá sóknarfútanum og spældu í einum báti við Tjørnabrúgv. Brádliga dettur Ragnar á sjógv og Dallahan, sum stendur á brúnni, ser tilburðin, og skjótur sum eitt snarljós, kavar hann eftir honum og bjargar honum.

Dallahan og eg vóru mangan túrin saman til sjós. Á fysta túrinum sum Borgin hevði til Grønlands í 1957, fingu vit ein ógvusligan sjógv, sum kom aftanífrá. Av níggju rútum brotnaðu teir átta, dekkið fyltist við sjógvi, og lensiportrini tóku ikki ímóti. Vit vóru um at kollsigla. Tá var Dallahan skjótur, tók pumpunikkulin, kavaði og breyt skansaklædningin, so sjógvurin streymaði út. Spakuliga rættaði Borgin seg upp aftur. Soleiðis bjargaði hann okkum øllum. Fyri hetta bragd átti hann at fingið eina "medalju".

Hóast stóra mótgongd í lívinum kundi Dallahan vera sera skemtingarsamur. Hann dugdi á ein livandi hátt væl at siga frá øllum tí, honum hevði verið fyri á skipsdekkið og í gerandislívinum. Serliga søgurnar um tíðina hann var í Ghana og lærdi ghanesarar at fiska við troli, vóru serliga stuttligar. Ein góður frásøgumaður eigur altíð at leggja eitt sindur aftrat, tað ger altíð søguna betri.

Góði Dallahan, stoltasta og ein av tínum heilt glaðu løtum, mátti helst vera, tá ið tú á Bakkanum í Vági, slapp at heilsa uppá grønlendska landsstýrisformannin Hans Enoksen og konu hansara. Tú kendi jú Hans Enoksen og familju hansara frá lítlu bygdini Itilleq, har vóru vit jú oftani við Borgini. Dallahan sigldi annars í mong ár við grønlendskum rækjutrolarum, og kønur var hann sum trolmaður.

Dallahan var streymkønur sum fáur, tað ættarbreðgið hevði hann eftir teim gomlu á Krosslið, sum ikki vóru tiknir í leikum sum sjómenn og fiskiklógvir.

Dallahan bróður, nú ert tú farin, og stórur var skarin sum fylgdi tær til títt seinasta hvíldarstað á Kirkjukletti. Nú hvílur tú millum tey, sum stóðu tínum hjarta nær. Minnið um teg vil altíð liva í huga okkara. Djúpt verður tú saknaður av okkum øllum, Red, Gunnari og abbabørnunum. Tú vart eitt fantastiskt menniskja, barna- og manndómsárini høvdu verið fátøk uttan teg, trúfesti og vinsemi var títt skjaldramerki. Friður veri yvir minnið um beiggja mín Dallahan hjá Torvaldi.

**Bróðir tín Anthon**

## Tøkk

Vit takka hjartaliga fyri sýnda samkenslu, tá ið okkara elskaða kona, mamma, vermamma, omma, dóttir og systir

**Berghild á Steig**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri kransar, blómur og nógvu peningagávurnar til Føroya Felag móti krabbameini.
Tøkk til Hanus Simonsen, prest, fyri góð og troystarrík orð.
Tøkk til Eiler fyri góðan tónleik og Leif fyri vakran sang í kirkjuni.
Tøkk til kirkjutænarar og sangarar.
Tøkk til Hans Andrias, Jens og Brandur.
Tøkk til starvsfólkini á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Ríkissjúkrahúsinum og Hotell Tórshavn fyri stóra umsorgan.
Tøkk til tykkum, sum høvdu hugnað um heimið, tá vit komu úr Danmark.
Tøkk til starvsfólkini á Barnatannlæknastovuni, læknaskrivarnar og onnur, sum hjálptu so væl til á ymsan hátt við jarðarferðini og ervinum.
Hjartaliga tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Bogi, Dan, Gunnar og Rannvá**

## Dagurin

**14. apríl. Summarmáli.** Eftir gamlari føroyskari tíðarrokning byrjar summarhálvárið hendan dag. Sagt var, at á summarmála avdagast ikki, tí var klárt í veðrinum, skuldi dagsglæman ikki hvørva. Soleiðis sum summarmáladagur er, soleiðis verður várið. Dagurin eitur annras Tiburtius. Saman við bróður sínum varð hann tikin av døgum umleið 225.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*





BRENNIR TÚ FYRI KOPPUM, GRÝTUM OG KANNUM?
– SO HAVA VIT STARVIÐ

Maria Poulsen Búnýti søkir eftir einum starvsfólki vegna barnsburðarfarloyvi. Vit sóknast eftir einum dugnaligum starvsfólki, ið hevur áræði og eina vinarliga atferð. Rætta starvsfólkið kennir týdningin av at veita eina góða tænastu til kundar okkara, og skal kunna taka ábyrgd og klára at arbeiða sjálvstøðugt.

Tað er til fyrimuns, um tú hevur royndir frá handli ella líknandi ella hevur eina viðkomandi útbúgving. Starvssetan er frá 1. juni 2009.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Súsannu á Dul, leiðara, á telefon 312 001.

Skrivlig umsókn saman við próvskjølum, CV o.ø. skal vera okkum í hendi **20. apríl 2009 kl. 12.00.** Umsóknin skal sendast til:

MARIA POULSEN BÚNÝTI
Tórsgøta 10
Postboks 182
110 Tórshavn




Maria Poulsen Búnýti

Tel 312 001 | Fax 314 657 | bunyti@mariapoulsen.fo